er jú í sær sjálvum ikki so galið skoðsmál. Í okkara tungu og hátíðarligu standmyndatraditión tykist henda standmyndin hjá Wich deiliga løtt og øðrvísi. Við støði í mátanum, sum Mondrian skipaði sínar myndir við grundlitunum og svørtum og hvítum, hevur Ole Wich gjørt nakrar myndir, sum eru postkort- ella færøkitschkendar og sum hann orðaspælandi nevnir Monotóm Mondrian. Hóast speisku tilgongdina eru hesar myndir kanska óvæntað vorðnar nokkso penar og væl seldar eisini. Eg veit ikki um okkurt skeið hevur verið um Mondrian, men Jóna Rasmussen sipar so eisini til sama kenda hollendska listamann í síni fullkomiliga einkisigandi landslagsmynd.

## Lovaða landið

Edward Fuglø tykist í síni stóru mynd "The Promised Land" eitt sindur meira konseptuellur og minni illustrativur, enn hann er vanur, og tað er gott, tí tá ger tað minni, at hansara málingarlag kenst stirvið og óhegnigt. Á myndini síggja vit eitt stiliserað, horisontalt landslag við eini ørgrynnu av gulum skeltum við staðarnøvnum úr Ísrael, sum samstundis eru nøvn hjá ymiskum føroyskum samkomum. Boðskapurin er kanska ikki tann djúpasti, men tónin er klæðiliga speiskur.

Ditte M. Joensen er áhugaverd listakvinna, sum í sínum verkum sameinir tað fotografiska og tað konseptuella. Jóhan Martin Christiansen er eisini konseptuellur í síni listagongd og tó, at verkini stundum tykjast heldur tung og óforloyst, eigur hann rós fyri í so stóran mun at halda seg til eitt listaslag, sum vit at kalla onga siðvenju hava fyri í Føroyum.

**Ólavsøku-framsýningin er at síggja í Listaskálanum fram til 9. august**




*Skuggar darva myndini hjá Edvardi Fuglø*



*Framsýningarevnið er sum gjørt til Ole Wich*



*Ein ekstatisk fjallavisión hjá Arnoldi Vegghamar*